gongdina. Sum nevnt hevur yvirtøkan verið ætlað síðani 1998, tá ein nevnd var sett at fyrireika yvirtøkuna. Samráðingarnar við donsku stjórnina byrjaðu í 2001, og ein nýggj nevnd varð síðani sett í 2002.

Jógvan á Lakjuni metti, at eitt so týdningarmikið málsøki sum Fólkakirkjan skal hava ta neyðuga tíðina, ið eitt slíkt krevur. Landsstýrismaðurin segði seg eisini fegnast um, at Føroyar og Danmark megna at loysa stórar spurningar við samráðingum og demokratiskum miðlum. Harafturat segði Jógvan á Lakjuni, at yvirtøkan av kirkjuni er eitt stig á leiðini móti størri føroyskum sjálvbjargni, og at hendan gongdin snýr seg um at taka ábyrgd fyri egnari framtíð. Somuleiðis metti hann, at yvirtøkan fer at gagna kristnilívinum.

Landsstýrismaðurin endaði røðuna við sálminum hjá N.F.S. Grundtvig »Guds ord det er vort arvegods«. Sum eitt kuriosum kann nevnast, at landsstýrismaðurin eisini las ta føroysku týðingina hjá abba sínum, Victori Danielsen, »Guds orð er ogn og arvur tann«, ið stendur í »Songbók Guds fólks«.

Sálmurin er tó eisini at finna í »Sálmabók Føroya kirkju« í týðing hjá Jákupi Dahl, »Títt orð er, Guð, várt arvagóðs«.



# Sleppa at brúka donsk tilboð um útbúgvingar

**Føroyskir prestar sleppa framvegis at taka av tilboðum um skeið og eftirútbúgving í Danmark, hóast kirkjan verður yvirtikin. Eisini skal bispur at taka lut á fundum, tá teir donsku bisparnir hittast**

FÓLKAKIRKJAN
*Theodor E. D. Olsen*
*theodor@sosialurin.fo*



*Løgtingið og politiski fylgibólkurin í sambandi við yvirtøkuna av fólkakirkjuni vóru umboðaði av Poul Michelsen, Fólkaflokkurin, Andrias Petersen, Javnaðarflokkurin og Lisbeth L. Petersen, Sambandsflokkurin*

Yvirtøkan av fólkakirkjuni merkir ikki skilnað við ta donsku kirkjuna, staðfesti danski mentamálaráðharrin, Bertel Haarder á tíðindafundinum fríggjadagin. Hann legði dent á, at eisini framyvir er ætlanin at samstarva tætt.

Umframt at føroyskir prestar skulu sleppa at eftirútbúgva seg í Danmark, er ætlanin, at Føroya biskupur framvegis skal vera við, tá bisparnir í Danmark og biskupurin í Grønlandi hittast á fundum.

Harafturat sleppa føroyskir myndugleikar at brúka serkøna danska hjálp og møguliga rættarhjálp, um sonevndar lærusakir stinga seg upp. Tað vil siga um støða skal takast til, um til dømis ein prestur ikki verður mettur at hava boðað kirkjunnar læru.

Jákup Reinert Hansen, formaður í Prestafelagnum og limur í kirkjuliga fylgibólkinum, var til staðar á Norðurbryggjuni, tá yvirlýsingin varð undirskrivað. Hann metir tað hava stóran týdning fyri føroysku prestarnar, at teir framvegis sleppa eitt nú at eftirútbúgva seg og fara á skeið í Danmark. Harafturat vísir formaðurin í Prestafelagnum á, at í uppskotinum til løgtingslóg um Fólkakirkjuna í Føroyum, sum nú er til hoyringar, stendur m.a. í grein 7, stk. 3, at »Sóknarprestur (...) skal støðugt granska Guds orð og trúarinnar læru«.

Spurdur um hann væntar, at hetta eisini fer at galda í framtíðini, sigur Jákup Reinert Hansen, at tað er ein fíggjarligur spurningur.

## Týdningarmikið at fara uttanlands

Jógvan á Lakjuni, landsstýrismaður í mentamálum, sigur seg tó ikki hava hugsað um hetta, tá hann verður spurdur, um hetta kann samanberast við støðuna hjá føroyskum fólkaskúlalærarunum, ið fyri fáum árum kundu sleppa á árs-skeið í Danmark.

Hann metir ikki, at til ber at samanbera lærarastættina, ið telur eini 700 fólk, og føroysku prestarnar, ið eru eini 20 í tali, men viðgongur, at hann ikki kann siga, hvat framtíðin fer at bjóða uppá.

Jógvan á Lakjuni undirstrikar tó, at hann metir tað vera týdningarmikið, at til dømis føroyskir prestar sleppa út um landoddarnar at kunna seg og nema sær kunnleika, og heldur, at hetta eisini kann fara fram aðrastaðni enn í Danmark og nevnir Ísland sum eitt møguligt dømi.

**Meira um yvirtøkuna av fólkakirkjuni á næstu síðu**

# Drotningin má víkja

**Danski kirkjumálaráðharrin staðfesti fríggjadagin, at drotningin ikki kann vera yvirhøvd í føroysku fólkakirkjuni eftir yvirtøkuna**

FÓLKAKIRKJAN
*Theodor E. D. Olsen*
*theodor@sosialurin.fo*



*Frá samkomuni á Norðurbryggjuni í samband við undirskriving av yvirlýsing um fólkakirkjuna. Fremst í myndini Niclas Foldbo, sum umboðaði føroyskar kirkjuráðslimir*

Føroyska fólkakirkjan verður framvegis evangelisk-luthersk, um Føroya Løgting samtykkir at yvirtaka hana á ólavsøku í ár. Hetta stendur í uppskotinum, sum nú er til

løgtingslóg um Fólkakirkjuna í Føroyum. Mentamálaráðharrin metir, at vit enn eru bundin av donsku grundlógini, ið ásetur kirkjunnar læru, hóast hann ikki vil vera við, at landsstýrið hevur bundið seg til nakað í samráðingunum við donsku stjórnina

Á tíðindafundinum á Norðurbryggjuni fríggjadagin, vildi danski kirkjumálaráðharrin, Bertel Haarder, ikki svara beinleiðis uppá, um føroyskir myndugleikar hava bundið seg til, at føroyska kirkjan skal vera evangelisk-luthersk.

Jógvan á Lakjuni, landsstýrismaður í mentamálum, sigur tó, at føroyskir myndugleikar ikki hava bundið seg beinleiðis til nakað, men at hetta er »undirforstaðið«, sum hann tekur til, tí allir flokkar eru samdir um hetta.

- Tað er heilt greitt, at vit yvirtaka kirkjuna í verandi bygnaði, sigur landsstýrismaðurin.

Harafturat leggur hann afturat, danska grundlógin enn er galdandi fyri Føroyar, har tað í grein 4 verður staðfest, at kirkjunnar læra skal vera evangelisk-luthersk.

Spurdur um danski kirkjumálaráðharrin metir, at Føroyar enn verða bundnar av hesi grein í donsku grundlógini, sigur Bertel Haarder:

- Det er vi enige om.

- Det ligger i lovforslaget.

- Man kan sige det på den måde, at den luthersk-evangeliske kirkes indhold vil være det samme, for den er jo lige så færøsk, som den er dansk.

Drotningin kann tó ikki vera yvirhøvd í føroysku fólkakirkjuni, staðfestir danski kirkjumálaráðharrin.

Bertel Haarder sigur, at hann einki hevði havt ímóti, at danska drotningin var yvirhøvd í føroysku kirkjuni, men av tí at ein ráðharri altíð skal skrivað undir vegna danska statin, tá lógir skulu staðfestast, ber hetta ikki til sambært donsku grundlógini.

## Maskinstjóri

Søkt verður eftir maskinstjóra til verksmiðjutrolara, til fiskiskap í Stillahavinum.
Skipini eru bygd í 1991-1993, eru 105 metrar til longdar og 20 metrar breið.

Høvuðsmaskina 6000 kW Wartsila.

Brattvaag trolspøl, MWM Deutz hjálpimotorar, York/Sabroe frystiútgerð.

Fyrispurningar og umsóknir verða at senda til Jan Erik Simonsen, tekniskur deildarleiðari á t-post: janerik@thor.fo

**P/F Thor Fisheries**
Bryggjan 5
Hósvík

Thor Fisheries er dótturfelag hjá P/F Thor í Hósvík. Dótturfelagið varð stovnað í januar 2007, og rekur tvey verksmiðjuskip, ið fiska í sunnara parti av Stillahavinum. Tað eru 260 fólk í starvi hjá Thor Fisheries.